## Drogba vil halda fram í Chelsea

Didier Drogba hevur havt ein misjavnt kappingarár í enska felagnum Chelsea, og móti endanum gjørdi hann vart við seg á heldur óhepnan hátt. Síðani hava søgur gingið um, at Chelsea vil sleppa av við Drogba, men sjálvur hevur álopsspælarin hug at halda fram í Chelsea. – Eg eri errin av at spæla fyri Chelsea, og eg haldi fram so leingi, sum felagið vil hava meg, sigur Drogba við Sporting Life.



## Xavi: Carrick er størsta hóttanin

Barcelona-spælarin Xavi Hernandez heldur, at tann størsta hóttanin hjá Manchester United er miðvallarspælarin, Michael Carrick. Tað sigur Xavi undan finaluni í Champions League-finaluni mikukvøldið. – Carrick er ein sera týðandi spælari fyri United – bæði í álopsspælinum og í verjuspælinum. Eg haldi, at hann er tann mest kompletti spælarin hjá United, sigur Xavi.

B68-07 Vestur 2-1 (1-1):

# Keita var munurin

**Ahmed Keita átti avgerandi leiklut, tá B68 í gjár otaði seg nærri oddanum við sigri á uppflytarunum úr 07 Vestur. Toftamenn hava nú ikki tapt síðan fjórða umfar**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

*B68*

*07 Bestur*



*Í løtum – sum her – sást ikki nógv til Keita, men hann legði upp til fyrra málið hjá B68 og skoraði tað seinna. Og tað var nóg mikið til, at hann fekk avgerandi týdning fyri úrslitið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var ein lættur og glaður Bill Mc.Leod Jacobsen, venjari hjá B68, sum eftir dystarlok í gjár takkaði mótstøðuliðnum fyri dystin. Hann og toftamenn eru nú ósigraðir í síðstu fimm dystunum, og sum úrslitini lagaðu seg í gjár, er B68 nú á fjórða plássinum. Og tað fegnast tey sjálvsagt um á Toftum.

Ahmed Keita var aftur í gjár ein støðug hóttan hjá toftamonnum. Hann átti uppleggið til fyrsta málið, og stóð sjálvur fyri tí seinna, tá B68 fekk fult á Svangaskarði ímóti 07 Vestur. Gestirnir hóvdu bóltin nógv, men høvdu ikki neyðuga framherjan, sum skapti møguleikararnar. Men tað høvdu toftamenn í Keita.

### Stóð seg væl

Keita skjeyt í gjár sítt mál nummar fimm í hesum kappingarárinum. Tað er ein triðingur av málunum, B68 higartil hevur skotið. Framherjin er væl fyri kropsliga, og serliga á fyrstu metrunum hevur hann ein fyrimun ímóti fleiri av tungu føroysku verjuspælarunum. Tað var dysturin í gjár fleiri ferðir dømi um. Hann stríddist fyrst væl, áðrenn Jóan Símun Edmundsson í brotsteiginum legði heimaliðið á odda, og tá ein tími var leiktur, var hann fyrstur á returbólti, tá hann skjeyt sigursmálið.

Í løtum sást ikki nógv til Keita, men hann var við í báðum málunum. Og tað var nóg mikið.

### Løgdu bragdliga fyri

07 Vestur byrjaði annars væl. Tór-Ingar Akselsen hevði eina roynd beinanvegin, sum Vlada Filipovic í málinum fekk trupulleikar av. Men tað vendi skjótt.

Tá Jóan Símun Edmundsson legði heimaliðið á odda, tóktist tað sum at toftamenn tordu betur. Bæði liðini trýstu í løtum, men tað var uttan nakað sum helst úrslit. Møguleikarnir kundu teljast á aðrari hondini, og tað átti avgerandi leiklut í, at dysturin var einum av teimum keðiligu higartil í hesum kappingarárinum.

Óli Olsen átti stutt fyri hvíldina vandamestu roybdina, tá hann rakti í stólpan.

### B68 er við

Tað eru fleiri ymiskar typur av fótbóltsleikarum, sum manna plássini hjá toftamonnum í ár. Ein væleydnað blanding av yngri og eldri, stríðshugaðum og luksusspælarum og sterkum og skjótum leikarum. Í gjár prógvaðu teir sítt virði bæði í álopspartinum og verjuspælinum. Serliga seinastu løtuna í aftastu ketuni, tá gestirnir royndu at trýsta fyri útjavnandi málinum, riggaði samstarvið væl. Hópurin er áhugaverdur, og sleppur venjarin undan ov nógvum skaðum og leikbannum, er líkt til, at B68 fara at kappast um evropeisku plássini.

Tað eydnaðist aftur í gjár hjá 07 Vestur at skjóta mál, men heldur ikki hesa ferð gav tað stig. Teir hava skotið mál í hvørjum dysti, men higartil sæst tað ikki aftur á stigatalvuni. Liðið liggur undir niðurflytingarstrikuni, tvey stig frá bjargingini. Tað er serliga á heimavøllinum, at uppflytararnir skulu fáa síni stig, og tað er høvið til longu komandi sunnudag, tá EB/Streymur vitjar í Sørvági.

Leikliga stóðu teir seg kanska betur enn B68 í gjár, men tað hjálpir lítið, tá liðið í verjustøðu ikki heldur mótstøðuni burtur frá møguleikum. Og tað var munurin í gjár.

## Skjóta neyðugu málini

Øssur Hansen var ikki við í gjár vegna skaða. Men hann frøddist sjálvsagt um tey trý stigini, sum liðfelagararnir vunnu í gjár.

– Tað var uppiborið, haldi eg. Vit spældu ikki serliga væl í stórum løtum av dystinum, og veðrið ávirkaði eisini spælið. Men vit skjóta neyðugu málini, sum skulu til fyri at vinna fótbóltsdystir, segði Øssur Hansen, sum rósti Ahmed Keita fyri sítt avrik.

*Hvussu eru tit nøgdir við fyrstu níggju dystirnar?*

– Tað sær í øllum førum spennandi út. Vit eru nú á fjórða plássinum, men tað er langur vegur eftir á mál. Komandi vikuskifti vitjar HB her á Svangaskarði, og tá mugu vit fáa fult, um vit skulu hanga í, segði Øssur Hansen.

*-uni*

## Stigini koma skjótt

– Vit vóru omaná í fyrra hálvleiki, men vit skaptu ikki størvegis. Og tá hjálpir tað lítið at vera á bóltinum, segði Tór-Ingari Akselsen eftir dystin á Toftum í gjár. Hann staðfesti, at toftamenn ikki stóðu seg betur enn uppflytararnir.

– Keita er altíð ein hóttan, og tað var einki undantak í gjár. Í fyrsta málinum hjá teimum missa vit bóltin í uppspælinum, og síðani gera teir skjótt av. Og tað vóru tílíkar støður, sum teir vóru vandamiklir uppá. Stutt eftir, at vit hava javnað, var Jens Erik Rasmussen feldur á brotsteigarmarkinum, men dómarin dømdi ikki. Tá Keita fekk avgerandi málið, hildu fleiri, at Jóan Símun Edmundsson framdi fríspark ímóti Sjúrði Ellefsen. Tílíkar støður kundi havt við sær, at úrslitið var eitt annað, tí marginalar skiltu liðini. Men vit eru við gott mót og ivast ikki í, at stigini fara at koma skjótt, segði Tór-Ingar Akselsen.

*-uni*